

## Stoltenberg í Reykjavík

Herfyri var fyrrverandi norski uttanríkis- og verjumálaráðharrin Thorvald Stoltenberg í Føroyum og helt fyrilestur, og nú hevur hann verið í Íslandi í somu ørindum. Fyrradagin helt hann fyrilestur á lærda háskúlanum í Reykjavík um norðurlendskt samstarv og trygdarpolitikk. Í fyrilestrinum viðgjørdi hann millum annað eina frágreiðing, sum hann hevur skrivað um, at Norðurlond í felag átaka sær at hava eftirlit við íslendska loftrúminum. Í frágreiðingini mælir Thorvald Stoltenberg eisini til størri norðurlendskt samstarv á sendistovuøkinum, sjóverjuøkinum og í friðarvarðveitandi tiltøkum.

## Drongurin skal eita Lukas

Foreldur í Danmark, Noregi og Svøríki eru eftir øllum at døma samd um, at navnið Lukas er vakrari enn onnur mansnøvn. Í øllum trimum londunum var Lukas-navnið tað, sum flestu dreingjabørn fingu í fjør. Tann einasti munurin var, at í Danmark valdu tey flestu at stava navnið við c heldur enn k. Harafturímóti høvdu foreldrini í Danmark, Noregi og Svøríki ikki somu uppfatan, tá tey skuldu geva teimum smáu gentunum navn. Í Danmark var Sofie tað mest brúkta gentunavnið í fjør, í Noregi var tað Linnea og í Svøríki Maja.

# Politikkur má í matin

**Profilarnir innan norðurlendskan mat fóru ovfarnir avstað aftur. Orsøkin til ovfarni var góða føroyska matgerðin, sum andar hóast trong kor. Nú verður bert bíða eftir politikarunum, sum eru teir einastu, ið kunnu hjálpa illa sperdu vinnuni**

MATVØRUVINNA

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Leif Sørensen, føroyska umboðið í Nordisk Mad er fegin um vitjanina, Føroyar hava havt av norðurlendsku profilunum innan matgerð. Talan er um matambassadørarnar.

- Endiliga standa 10 onnur við skili fyri mati og siga tað sama sum eg. Eg hopi, at vit í minsta lagi eru komin 10 prosent longri nú, sigur Leif Sørensen.

Hinir ambassadørarnir úr norðurlondum vóru ovfarnir av føroyskum mati, men hildu tað samstundis vera ófatiligt, at matstovuvirksemi trívist í landinum, við teimum treytum, matstovurnar mugu arbeiða undir.

Á tiltaki fyri politikarar og journalistar, sum var í kantinuni á Tinganesi í gjár, tóku umboð fyri Nordisk Mad orðið. Har var millum annað sagt, at felagsnevnarin fyri norðurlendskan mat er, at maturin er feskur, reinur og einfaldur. So er upp til kokkarnar at skapa upplivingar, og at tilpassa matin til nýmótans lív. Tað skal vera ein stoltleiki at vísa fram matin, og bonusið er at landið nýtir gott av stóra ma rknaðarføringsvirðinum.

Men føroysk matstovuvinna hevur nógvar trupulleikar at dragast við, og teir einastu, ið kunnu hjálpa, eru politikarnir.

### Vit hava nógvar trupulleikar

Sjálvur landsstýrismaðurin í vinnumálum var vertur fyri døgurðan í Kirkjubø, har hann hitti hinar norðurlendsku kokkarnar. Í morgun beyð hann saman við landsstýriskvinnuni í mentamálum Leif Sørensen til fundar. Har varð prátað um hvat gerast skal fyri at bøta um korini hjá matstovuvinnuni í Føroyum.

- Jóhan Dahl hevur biðið okkum um at gera eitt upplegg við tilmælum um hvat skal gerast. Og har hevur matstovufelagið gjørt eitt upplegg, har vit koma við uppskotum til broyting av fíggjarligum viðurskiftum, broyting í skonkilógini og ymiskt annað, sigur Leif Sørensen.

Millum matambassadørarnar eru ikki minni enn 3-4 sjónvarpskokkar, tveir professarar innan mat, og heimsins bestu í Finnlandi, Álandi og Svøríki. Hesar dagarnar ambassadørarnir hava hitst í Føroyum, hevur føroyski trupulleikin verið umrøddur.

- Vit hava so nógvar trupulleikar. Men ein er at vit ikki keypa føroyskt sjálvi. Í Svøríki er mann farin at fokuserað meir upp á svensku vinnu, og tað skuldu vit eisini gjørt. Við at vit keyptu til dømis lunda, eplir og grønmeti frá veitarum, tryggjaðu vit virksemi so at siga alt árið, sigur Leif Sørensen.

### Tað ræsta er ein skattakista

Matur er mentan. Vit skulu duga at útnytta okkara matsið tá ferðafólk koma hendan vegin. Tey koma aftur, tí tey fáa góðar matupplivingar. Tí er tað so umráðandi, at skapa gott grundarlag fyri føroyskari matvøruvinnu.



*Føroyski maturin fekk høvi at vísa sítt virði, tá umboð fyri Nordisk Mad vóru í Føroyum og vitjaðu. Her síggjast tvey sløg av laksi, heit- og kaldroyktur, sum var forrættur í kantinuni á Tinganesi í gjár*

Lyklaorðið er at vit mugu hava fleiri bein at standa á, og bróta upp úr nýggjum viðvíkjandi føroyskum mati. Norski ambassadørurin var ovurfegin um føroyska matin, og hálovaði ræsta matinum sum eina føroyska skattakistu.

- Vit skulu hava meir stoltleika inn í okkara matsið, og vera errin av okkara egna tilfeingi. Ein klókur maður segði fyri langari tíð síðan: Gev einum kokki alt honum tørvar, og tú skal síggja undurverk. Og tað er nakað um tað. Tað kunnu vit nýta júst nú í hesari støðuni, sigur Leif Sørensen.

# Matvøruvinnan skal raðfestast

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, heldur at føroysk matvøruvinna hevur uppiborið hægri raðfesting. Ein áhugaverd vinna, sigur hann**

MATVØRUVINNA

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Jóhan Dahl hevur verið til staðar hesar dagarnar, norðurlendsku mat ambassadørarnir hava vitjað.

- Eg má siga, at hetta hevur verið eitt gott tiltak fyri okkum, sum vanliga ikki hugsað um slíkt, sum mat. Hetta hevur verið sera gevandi fyri meg, sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl.

Í morgun var ein fundur millum hann, landsstýriskvinnuna í mentamálum og kokkin á Gourmet, Leif Sørensen.

- Eg kundi hugsað mær, at matvøruvinnan fekk eina hægri raðfesting. Tí havi eg biðið Leif Sørensen um at koma við einum uppleggi, har tey mæla til hvørjar broytingar skulu gerast. Jú skjótari tað verður gjørt, jú skjótari kann tað fáa politiska viðgerð.



*Landsstýrisfólk fingu høvi at royna leskiliga matin, Leif Sørensen hevði gjørt. Her heilsast føroyski mat ambassadørurin og Kaj Leo Johannesen, løgmaður. Leif Sørensen vónar, at matvøruvinnan við hesum fær meir ans*



*Kokkarnir fóru ovfarnir avstað aftur. Føroyski maturin hugtók teir, og vóru teir ovfarnir av at føroyskar matstovur trívast undir slíkum korum. Jóhan Dahl, avvarandi landsstýrismaður, vil fegin hava at føroysk matvøruvinna verður betri raðfest*

Jóhan Dahl sigur, at hann hevur fingið nógv burturúr fundinum, og at hann ynskir at matvøruvinnan verður betri raðfest.

- Arbeiðið, sum hini londini hava gjørt í samband við Nordisk Mad er heilt fantastiskt. Teirra matgerð hevur gjørt norðurlond heimskend. Tak bara donsku matstovuna, Noma, sum er triðbest í heiminum. Vit hava góðar rávørur í Føroyum, og vit kunnu læra nógv av Nordisk Mad samtakinum. Eitt nú veit eg, at Noreg nýtir Stavanger, til at marknaðarføra seg sum land, sigur Jóhan Dahl.

Hann leggur afturat, at við at menna matvøruvinnuna, kunnu vit seta ferð á føroyska ferðavinnu, og tí skal matvøruvinnan avgjørt vera partur av vinnumenningini í Føroyum.